**Avgerð 2/2008 frá Yvirkærunevndini**
**hjá**
**Fótbóltssambandi Føroya**

**Viðvíkjandi kæru frá 07 Vestur um úrskurð hjá Aganevndini, dagfest hin 29. mai 2008**

Yvirkærunevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya hevur fingið eitt mál til avgerðar, sum snýr seg um hvørt 07 Vestur í einum dysti móti MB tann 12. mai 2008 brúkti ein ólógligan leikara. Talan er um ein dyst í 2. deild menn.

Í úrskurði, dagfestum 29. mai 2008, hevur Aganevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya tikið avgerð um, at 07 Vestur verður dømt at tapa dystin móti MB av tí, at 07 Vestur brúkti ein leikara í dystinum, sum tann 4. mai 2008 í einum dysti í 2. deild menn hevði fingið reyða kortið, við tí sanktión, at hann hevði leikbann í næstkomandi dystinum, sum 07 Vestur skuldi leika.

Aganevndin er av tí fatan, at tann komandi dysturin, sum viðkomandi leikari ikki skuldi verða við í, var dysturin milllum 07 Vestur og MB 2. deild menn, sum var leiktur tann 12. mai 2008. Tá ið viðkomandi leikari var við í hesum dystinum, var niðurstøðan hjá Aganevndini hon, at leikarin var ólógligur og tí var 07 Vest 2. deild menn dømt til at tapa dystin, sum var leiktur 12. mai 2008 millum 07 Vestur og MB.

Aganevndin vísir í síni avgerð til § 36, stk. 4 í kappingarreglunum, har ásett er, at: "Givnar ávaringar føra við sær leikbann fyri viðkomandi leikara í teirri deild hann hevur fingið ávaringina. Ávaringar givnar í steypakappingum eru bert galdandi fyri dystir í steypakappingini." Grunda á hesa tilvísing tekur Aganevndin avgerð um, at leikarin ikki hevur haft møguleika at sita yvir dyst í somu deild, sum viðkomandi fekk leikbann í.

**Formellar reglur**
Yvirkærunevndin hevur viðgjørt kæruna frá 07 Vestur við heimild í § 11, stk. 4 í agareglugerðini, har tað framgongur, at Yvirkærunevndin tekur avgerðir í kærumálum viðvíkjandi avgerðum hjá Aganevndini, ið ikki eru endaligar.

Sambært § 12, litra f) í agareglugerðini kann ein avgerð frá Aganevndini um, at eitt felag verður dømt til at tapa ein dyst, kærast til Yvirkærunevndina og skal hetta sambært § 12 verða gjørt innan 5 dagar aftaná at kærarin hevur móttikið úrskurðin.

07 Vest hevur móttikið úrskurðin frá Aganevndini tann 30. mai 2008. Kæran frá 07 Vestur til Yvirkærunevndina er send við teldupsti hin 30. mai 2008 og við telduposti hin 2. juni 2008 er kæran grundgivin. Kæran er tí latin inn rættstundis.

**Fakta í málinum**
Yvirkærunevndin hevur í sambandi við støðutakanina til kæruna frá 07 Vestur lagt til grund, at gongdin í málinum hevur verið hendan:

Tann 4. mai 2008 var dystur millum B36 og 07 Vestur, 2. deild menn. Ólavur Jensen, sum er vaksnamannaleikari, er leikari hjá felagnum 07 Vestur. Í tí dystinum varð Ólavur Jensen útvístur – hann fekk reytt kort.

Tann 7. mai 2008 var dystur millum 07 Vestur og Víking, 1. deild menn. Ólavur Jensen var ikki við á dómaraseðlinum til tann dystin.

Tann 10. mai 2008 var dystur leiktur millum B68 og 07 Vestur, 1. deild menn. Ólavur Jensen var ikki við á dómaraseðlinum til tann dystin.

Tann 12. mai 2008 var dystur leiktur millum 07 Vestur og MB, 2. deild menn. Ólavur Jensen var á dómaraseðlinum til tann dystin.

**Avgerð hjá Yvirkærunevndini**

Yvirkærunevndin vil í avgerð síni vísa til § 36, stk. 1 í kappingarreglunum.

Ólavur Jensen, sum er vaksnamannaleikari, fekk tann 4. mai 2008 reytt kort í einum dysti í 2. deild menn. Í tí dystinum varð hann, vísandi til § 36, stk. 1, 1. pkt. útvístur og ein avleiðing av reyða kortinum, sum hann fekk var, at hann fekk leikbann fyri fyrsta dystin, sum hann lógliga kundi taka lut í.

Yvirkærunenvdin er av tí fatan, at tá ið Ólavur Jensen er vaksmannaleikari, hevur tað ikki týdning, í hvørji deild, hann fekk reyða kortið. Ásetingarnar í § 36, stk. 1, 2. og 3. pkt. í kappingarreglunum, eru ikki relevantar í hesum máli, av tí, at hesi punktini einans eru galdandi, tá ið talan er um ungar dreingir, tvs. teir, sum td. eru 16 ár og hava fingið loyvi at spæla í vaksmannadeildum.

Aganevndin hevur í síni avgerð víst til § 36, stk. 4 í kappingarreglunum, og grundað á hesa áseting, hevur Aganevndin tikið avgerð um, at 07 Vestur skuldi tapa dystin, sum var leiktur millum 07 Vestur og MB tann 12. mai 2008. Aganevndin vísir í avgerð síni á, at Ólavur Jensen ikki hevði sitið leikbanni av.

Yvirkærunevndin er av tí fatan, at § 36, stk. 4 ikki kann brúkast í hesum máli. Hetta málið snýr seg um, at leikarin varð rikin úr dýstinum – tvs. fekk reytt kort, jvb. § 36, stk. 1, 1. pkt., og ikki um § 36, stk. 4, ið snýr seg um givnar ávaringar, sum hava við sær, at leikarin far leikbann eftir at hava fingið eitt ávíst tal av ávaringum.

Yvirkærunevndin er av tí fatan, at fyrstkomandi dystur hjá 07 Vestur var 7. mai 2008. Um Ólavur Jensen ikki tann 4. mai 2008 hevði fingið leikbann, kundi hann havt leikt við í hesum dystinum. Yvirkærunevndin er av tí fatan, at tá ið hann ikki var við í hesum dysti, situr hann yvir leikbannið (reyða kortið), sum hann fekk í dystinum millum B36 og 07 Vestur, 2. deild menn.

At Ólavur Jensen so umframt ikki at verða á dómaraseðlinum í dystinum tann 7. mail 2007, eiheldur er á dómaraseðlinum tann 10. mai 2008 hevur tað avleiðing, at hann kann brúka dystin 10. mai at yvirsita frá hægri til lægru deild, tí gangast má út frá, at brúkar hann hægri deild at sita leikbann av, má hann roknast at hava verið við í hægri deild og má tí brúka ein dyst í ovari deildini at sita yvir fyri at koma niður á lægri deild.

Við støði í fakta í málinum og vísandi til § 36, stk. 1, 1. pkt. í kappingarreglunum, metir yvirkærunevndin at grundarlag ikki er fyri at døma 07 Vestur at tapa dystin móti MB.

Yvirkærunevndin er av tí fatan, at Ólavur Jensen hevði sitið sítt leikbann av tann 7. mai 2008 og tað, at hann ikki var við í dystinum tann 10. mai 2008, hevði við sær, at hann lógliga kundi leika dystin tann 12. mai 2008 móti MB, 2. deild menn.

Avgerðin hjá Aganevndini um at 07 Vestur verður dømt at tapa dystin móti MB í 2. deild menn fyri at hava brúkt ein leikara í dystinum, sum ikki hevði sitið sítt leikbann av, verður tí sett úr gildi. Úslitið frá dystinum, sum endaði við 2-1 til 07 Vestur, skal tí standa við.

Tórshavn 7. juni 2008

Birta Biskopstø | Andrass Holm Arge | Jens Erik Magnussen